# Ashcroft kann kærast

Í USA hevur ein dómstólur gjørt av, at fyrrverandi løgmálaráðharrin John Ashcroft kann stevnast fyri rættin fyri ólógliga handtøku. Málið snýr seg um, at løgreglan handtók Abdullah al-Kidd í 2003 og hevði hann sitandi í varðhaldi í 16 dagar, tí løgreglan helt, at hann visti okkurt um yvirgangsvirksemi. Dómstólurin sigur, at løgreglan hevði ikki heimild til at hava mannin so leingi í varðhaldi uttan at ákæra hann. John Ashcroft, sum var løgmálaráðharri í 2003, bað dómstólin vísa málinum burtur, men tað vildi dómstólurin ikki. Spurningurin er nú bara, um fyrrverandi løgmálaráðharrin verður stevndur.



# Obama mist ráðgeva

Van Jones, sum hevur verið ráðgevi hjá Barack Obama, forseta, hevur lagt frá sær eftir at hava verið fyri hvøssum atfinningum. Van Jones, sum var ráðgevi forsetans í umhvørvismálum, var fyri hvøssum atfinningum, tí hann hevði skrivað undir eitt mótmæli, sum legði stjórnina hjá George W. Bush undir at hava vitað, at menn fyrireikaðu atsóknina tann 11. september í 2001. Jones hevur biðið um umbering fyri skuldsetingina, men sigur, at hann hevur ikki fingið rættvísa viðferð frá sínum mótstøðumonnum. Van Jones segði um vikuskiftið, at hann var farin frá sjálvboðin.





*Jørgen av Vollanum er nú leysur av dóminum, og tað kemur ikki minst av ára langa stríðnum hjá mammuni, sum alla tíðina hevur víst aftur, at sonurin gjørdi nakað kriminelt, tá ið hann varð handtikin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Kroystur

Mamman er sannførd um, at Jørgen ongantíð hevur verið kriminellur. Hann varð kroystur til at viðganga og gjørdist frá sær sjálvum av at skula liva undir slíkum umstøðum.

- Hvør hevði ikki verið tað, sum var útsett fyri alt hetta? spyr mamman.

Tá ið trý ár vóru liðini, royndi hon at fáa málið tikið uppaftur.

- Eg valdi so at bíða, tí eg var í teirri trúgv, at stovnurin fór at gera nakað, men tá ið tað so vísti seg, at stovnurin einki gjørdi, fór eg í hernað aftur, sigur mamman.

Javnan hevur hon havt fund við stovnin, Nærverkið, Javna, við Hans Paula Strøm, sum tá var landsstýrismaður og við onnur, men einki hjálpti.

Her skal viðmerkjast, at lógin í Danmark er broytt, soleiðis at slík mál verða tikin upp til metingar á hvørjum ári. Í Føroyum hendir einki, um ikki avvarðandi streingja á.

Tað, sum hjálpti Jørgen, var fyrst og fremst, tá ið Løgtingsins Umboðsmaður kom uppí og gjørdi vart við órímiligu viðurskiftini. Hon bað eisini um, at nýggj mentalkanning varð gjørd.

Nikolina bað sakføraran Hans Trúgva Teirin um hjálp, og tey so á fund við fútan. Hetta var fyri tveimum árum síðan, og fútin Karen Marie Olesen vildi gera sítt til at fáa málið tikið upp aftur í rættinum.

### Slapp at tosa

Jørgen var tá byrjaður at ganga til samtalur á psykiatrisku deild.

-Tað gjørdi honum ómetaliga væl at sleppa at tosa ígjøgnum alt tað, sum var kroyst innan í honum. Hann bleiv sum eitt heilt nýtt menniskja, sigur mamman.

Av stovninum í Hoyvík flutti Jørgen á ein stovn Oman Hoydalar. Har hevði hann tað einki serligt, tí tað vóru so nógv skiftandi starvsfólk við ymiskum holdningum.

Alt innbúgvið uttan songin varð tikið út av kamarinum. Jørgen varð viðfarin sum ein kriminellur maður, ið kundi hugsast at sett eld á.

- Tað hevði eg ikki funnið uppá, sigur Jørgen.

Seinastu tíðina hevur hann búð á einum bústovni á Bóndaheygi i Havn.

- Har er ordiliga gott at vera, og eg havi fingið mína egnu íbúð, sigur Jørgen.

Síðan hann flutti á Bóndaheyg at búgva, er friður fallin á Jørgen.

Hann fekk fríheitina til at fara tveir tímar í býin, seinni tríggjar tímar, og so fýra tímar.

- Og nú er einki mark, fegnast Jørgen um.

Hann veit tó væl, at heilt fríur verður hann ongantíð, tí hann verður noyddur altíð at liva eitt lív við føstum karmum, tí hann er menningartarnaður. Men tað styrkir hann, at hann hevur orð frá bæði læknum og rætslæknaráðnum, at hann ikki er sálarsjúkur.

### Bað politiið um loyvi at vitja mammuna

Seinastu tíðina hevur borið til hjá honum at sleppa heim til mammuna, sum býr við Gjógv okkurt vikuskifti, tá ið okkurt hevur verið. Men tað hevur kravt loyvi frá fútanum. Tey noyddust also at biðja politiið um loyvi. Viðhvørt rigg-aði tað væl, men var skotbráið ov stutt, var svarið nei.

Einar tvær ferðir hevur Jørgen hesi árini verið í Danmark, men tað hevur verið við flogfari, tí torført var hjá honum at sleppa við Nor rönu. Tvey starvsfólk noyddust at koma við. Mamman fekk eina ferð at vita, at tey ikki bara kundu taka hann við skipinum, tí um hann nú setti eld á? Um hann skuldi við, noyddist Smyril Line at vita tað frammanundan. Mamman gjørdist so karvandi óð, tí slíka treyt góðtók hon ikki.

### Innistongdur í Føroyum

- Seinasta ár fóru øll búfólkini á Bóndaheygi til Edinburg, men Jørgen slapp ikki við, Hann stóð eftir einsamallur á bryggjuni, sigur mamman.

Hon fekk eisini upplýst, at hann hvørki kundi koma inn í Ísland ella Noreg.

Jørgen upplivdi at gerast føroyameistari í Boccia og kundi tí koma til OL í Kina, men hann slapp ongan veg vegna sín dóm.

Jørgen hevur fingið tað betri og betri. Í dag hevur hann fast arbeiði á verkstaðnum Vón, og hann er eisini húsavørður á einum bústovni í Smærugøtu.

- Tað er so gott at vera á Bóndaheygi, og eg vil fegin takka øllum teimum fittu starsvfólkunum og ikki minst leiðaranum Juliannu, sigur Jørgen.

Hansara stóri dreymur er at sleppa ein túr við Norrönu, og nú kann hann fara umborð uttan at boða frá, hvør hann er.

- Eg eri so glaður, at tá ið vit fara umborð, skal eg bakka upp eftir landgongdini, sigur hann.

### Nýtt lív

Mamman viðgongur, at hesi 20 árini, sum frælsið var tikið frá Jørgen, hava verið ein strævin tíð. Men hon hevur klárað tað við stuðli frá børnunum, og tí hon hevur alla tíðina livað í tí trúgv, at alt fór at fáa ein góðan enda.

Jørgen kann nú byrja eitt nýtt lív, og mamman og hann vildu fegin lagt alt tað ringa aftur um seg, men ilt er at gloyma, tí hetta snýr seg um virðingina fyri teimum menningartarnaðu.

Jørgen kemur við seinastu viðmerkingini:

- Eg vil ávara øll menningartarnað um at ansa eftir ikki at koma í somu støðu, sum eg havi verið í, tí tað hevur verið ræðuligt.